FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

MEGD
Íslandsvegur 10C
FO-100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
J. nr. (MEGD): 1301-10-2025

Løgfrøðiliga ráðgevingin hjá MEGD

Ársfrágreiðing 2024

Samandráttur
1. mars í ár vóru hálvannað ár síðani, at løgfrøðiliga ráðgevingin hjá MEGD fór til verka. Talan er um royndarverkætlan og parttíðar starv, ið er fíggjað við peningi úr Verkætlanargrunninum hjá MEGD. Yvirskipaða endamálið við løgfrøðiligu ráðgevingini er at tryggja brekrættindi í verki, bæði formliga í lóggávu og í gerandisdegnum hjá fólki. Ráðgevingin er ætlað teimum umleið 4000 limunum í limafeløgunum hjá MEGD.

Royndirnar hava víst, at stórur tørvur er á løgfrøðiligari ráðgeving um brekrættindi, bæði yvirskipað, tá umræður at menna innlendis lóggávu, so at hon livir upp til altjóða sáttmálar, og ikki minni tá tað kemur til at veita fólki við breki vegleiðing og hjálp í gerandisdegnum við at lógartryggja rættindi teirra í føroyska samfelagnum. Hesa tíðina hevur tænastan fingið millum eina og tvær áheitanir um ráðgeving um vikuna. Sum oftast hevur talan verið um tíðarkrevjandi fyrispurningar.

Høvuðsøkið fyri ráðgevingina hevur verið almenna fyrisitingin. Nógvir av fyrispurningar hava snúð seg um viðgerð, samskifti, tænastur og veitingar frá Almannaverkinum og kommunum, har fólk við breki ella avvarðandi teirra hava ivast í galdandi rættindum og kent seg slept upp á fjall. Mál eru upplýst við innlitsumbønum og hjálpt er við skrivum ella sum hjásiti á fundum við myndugleikarnar.

Ráðgivið er í fleiri kæru- og klagumálum. Ráðgevingin hevur hjálpt við at kanna rættarstøðuna, við at orða skriv og við uppfylging undir málsviðgerðini. Eisini hava mál verið um tryggingarviðurskifti hjá fólki við breki og spurningar um

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

verjumál, sjálvsavgerðarrætt og foreldrasamstarv viðvíkjandi fólki við breki, ið búgva á stovni. Eisini hevur ráðgevingin í einstøkum føri hjálp til við at útvega faktuelt og løgfrøðiligt grundarlag fyri stevning.

Einstakir fyrispurningar hava kravt innlit í løgfrøðilig seløki, sum ráðgevingin ikki hevur. Tá hevur verið víst til advokatar, ið hava neyðuga innlitið, t.d. í familjurættarmál, politimál ella spurningar um endurgjald fyri sjúklingaskaðar. Limafeløgini hava fingið framløgu um løgfrøðiligu ráðgevingina í undanfarna ári og eftir ætlan verður limafundur aftur skipaður fyrra hálvár 2025.

1. Alment um ráðgevingina

1.1 Royndarverkætlan

Eftir at starvið varð lýst leyst og sett á sumri 2023 fór løgfrøðiligi ráðgevin til verka 1. september. Í starvið varð settur Dánjal Højgaard, cand. jur., sum frammanundan hevði arbeitt við starvsfólkamálum í Starvsfelagnum í fleiri ár.
Talan hevur verið um eina royndarverkætlan við varligari byrjan; í fyrstu syftu sum hálvtíðarstarv, ið varð sett fyri eitt hálvt ár. 1. mars 2024 varð starvið longt eitt ár og starvsbrøkurin hækkaður úr 20 tímum um vikuna upp í 28 tímar, og 1. mars 2025 verður starvið ætlandi longt eitt ár afturat.
Løgfrøðiliga ráðgevingin er partur av umsitingini í MEGD-húsinum og hevur avgreiðslutíðir týsdag til fríggjadag millum kl. 8.00 og 15.00.
Starvið verður fíggjað við peningi úr Verkætlanargrunninum hjá MEGD, og løgfrøðingurin er settur eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

1.2. Endamálið við ráðgevingini

Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðiliga ráðgevanum er,

- at veita limafeløgunum í MEGD, limum teirra og øðrum brúkarum løgfrøðiliga ráðgeving, sum kemur undir virkisøkið hjá feløgunum og
- at vera við til at menna rættindini hjá fólki við breki í føroyskari lóggávu við støði í Brekrættindasáttmálanum hjá ST

Av tí, at talan er um nýtt arbeiðsøki í MEGD hevur uppgávan hjá løgfrøðiligu ráðgevingini verið at útgreina

- í hvønn mun limafeløgini og limir teirra hava tørv á løgfrøðiligari hjálp, og
- hvat slag av málum – herundir á hvørjum samfelags- og lóggávuøkjum - tørvurin serstakliga er á løgfrøðiligari ráðgeving.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Málið við løgfrøðiligu ráðgevingini er

- at limafeløgini verða betri stillað í mun til at tryggja rættindi hjá limum ella avvarðandi í verki, bæði formliga í lóggávu og í veruligu viðurskiftum teirra.
- at altjóða brekrættindasáttmálin er grundaður á sokallaðu mannarættindatilgongdina (*Human Rigts Approach*), og vónin er, at hendan løgfrøðiliga ráðgevingin fer at vera við til at menna mannarættindatilgongdina í Føroyum, her undir lógartryggjað rættindi, munagóðar og væl skipaðar hoyringar, almennan hugburð og tilvitsku, praktiskan kunnleika og, sum heild, førleikar at tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek, í Føroyum.
- Hóast ein treyt at fáa ágóðan av løgfrøðiligu ráðgevingini er at vera limur í einum av limafeløgunum hjá MEGD, hevur ráðgevingin higartil verið loyvt undantøkum við tí grundgeving, at ráðgevingin tænir fólki, ið bera brek, og at hesi kunnu velja at gerast limir eftirfylgjandi.
- Hóast ætlanin ikki er at lýsa alment við ráðgevingini, fer verkætlanin tó vónandi at vera við til at økja um limatalið í limafeløgunum.

1.3 Uppgávur alment

1.3.1 Lógarfyrireiking

Løgfrøðiliga ráðgevingin hevur verið við til at skriva ummælisskriv til lógar- og kunngerðaruppskot, lutvíst saman við aðalskrivaranum hjá MEGD, sum hevur hetta sum ábyrgarøki, og lutvíst sjálvstøðugt, tá aðalskrivarin hevur borist frá.
Ráðgevingin hevur tikið lut og fyrireikað hoyringar í løgtingsnevndum, tá lógaruppskot hava verið fyri.
Eisini hevur ráðgevingin tikið lut á fundum, tá ið MEGD og limafeløgini hava verið boðin við til lógarfyrireikandi arbeiði, t.d. í sambandi við at dagføra dagstovnalógina, fólkaskúlalógina, arbeiði við barnaverkætlanini og at byggja stovnar fyri fólk við breki.

1.3.2. ST-hoyring

2024 var merkt av, at Brekrættindanevndin hjá ST lat sína eftirlitsfrágreiðing. Løgfrøðiliga ráðgevingin var við í arbeiðunum at skriva frágreiðingina, sum feløgini hjá fólki, ið bera brek, lata serfrøðinganevndini hjá ST, ið hevur eftirlit við íverksetanini av Brekrættindasáttmálanum. Eisini luttók ráðgevin vegna MEGD, tá ið feløgini og stjórnirnar í Danmark, Grønlandi og Føroyum vóru til hoyringar á ST-høvuðsborgini í Genéve í august 2024.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Arbeiðið við ST-frágreiðingini var tíðarkrevjandi, men hevur givið løgfrøðiliga ráðgevanum virðismikið innlit í brekrættindaøkið og tær avbjóðingar, sum eru við at íverkseta Brekrættindasáttmálan í innlendis lóggávu.

1.3.3. Innlitsmál

Umsóknir um innlit í fyrisitingina hevur verið fastur partur av arbeiðinum hjá ráðgevingini. Hetta hevur verið gjørt fyri at upplýsa málini betri og at fáa greiði á ætlanum, MEGD hevur frætt um og sum viðvíkja fólki við breki. Søkt hevur verið um alment innlit eftir innlitslógini, og sum umboð í persónsmálum, sum ráðgevingin hevur vegleitt um, hevur verið søkt um partsinnlit eftir fyrisitingarlógini.

Tá ið ráðgevingin hevur ráðgivið í persónsmálum, hava vanliga fólk givið samtykki til viðgerð eftir dátuverdarlógini og váttan um, at verða umboðað av ráðgevingini, tá ið tørvur hevur verið á tí.

1.3.4. Annað

Av øðrum kann nevnast, at ráðgevingin var við á Fólkafundinum í Runavík í 2024, har raðgevingin skipaði fyri framløgu og kjaki um hvussu rættindi í Brekrættindasáttmálanum kunnu gerast til veruleika. Tiltakið tók støði í hoyringarfundinum í Brekrættindanevndini hjá ST í Genève í august 2024. Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, við samskipandi ábyrgd av sáttmalanum, svaraði spurningum um hvussu landsstýrið ætlar at fremja tilmælini frá ST-nevndini í verki í Føroyum.

Eftir fyrsta hálva royndarárið hevði ráðgevingin framløgu fyri limafeløgunum, har greitt varð frá um virksemið og royndirnar hjá ráðgevingini.

Ráðgevingin hevur tikið lut á fundi fyri limafeløgini í MEGD, har kunnað hevur verið um arbeiðið við ST-frágreiðingini, hoyringini í Genève í august 2024 og tilgongdini, ið liggur fyri framman.

Ráðgeving hevur eisini verið á fundi við tryggingarfelagið LÍV fyri at kanna umstøðurnar hjá fólki við breki viðvíkjandi samlags- og lívstryggingum generelt.

Ráðgevingin hevur verið við í arbeiðinum at fyrireika klagu, ið varð send landsstýrismálanevndini hjá løgtinginum. Klagan var um, at landsstýrið í fleiri førum seinastu árini í ósamsvari við Brekrættindasáttmálan hevur lagt lógaruppskot fyri løgtingið, uttan at senda tey til hoyringar hjá avvarðandi feløgum og at greina avleiðingarnar fyri fólk við breki. Nevndin tók ikki klaguna til viðgerðar, við teirri grundgeving, at nevndin metir ikki, at talan er um møguligt brot á formligar lógir. Ráðgevingin hevur tikið lut í arbeiðinum, eittnú í samráð við advokat, at kannað aðrar møguleikar at royna málið, eittnú hjá løgtingsins umboðsmanni ella í rættinum.

Í ráðgevingini í persónsmálum hevur ráðgevingin eisini veitt upplýsingar um frían rættargang, advokathjálp og ráðgeving frá Rættarhjálp Føroya.

1.4. Hagtøl yvir virksemið

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Royndirnar vísa, at áhugin hevur verið rættuliga stórur at leita sær vegleiðing frá løgfrøðiligu ráðgevingini síðani hon byrjaði 1. september 2023. Tørvurin hevur víst seg at vera rættuliga greiður. Afturat almennu uppgávunum, sum eru lýstar omanfyri, vísir ein leyslig meting, at tað eru komnir millum 50 og 60 fyrispurningar uttanífrá til ráðgevingina. Tilgongdin hevur verið rættuliga støðugt gjøgnum tíðarskeiðið, millum ein og tveir fyrispurningar um vikuna, og tað tykist sum, at eftirspurningurin er vaksandi.
Fyrispurningar koma frá limafeløgum og frá limum í limafeløgunum ella fólki annars, ið hava brek ella teirra avarðandi. Spurningar koma onkuntíð ígjøgnum feløgini, men ofta venda fólk sær sjálvi beinleiðis til MEGD ella ráðgevingina. Tað kann vera gjøgnum telefon ella við at skriva inn. Spurt verður, um fólk eru limir, og eru tey ikki tað, verður víst á møguleikan við limaskapi.
Málini eru ymisk, og ymisk er hvussu nógva tíð og orku fyrispurningar krevja av ráðgevingini. Summir spurningar eru av slíkum slagi at teir kunnu svarast beinanvegin. Í øðrum førum krevjast nærri kanningar, bæði av faktisku viðurskiftunum og løgfrøðiliga grundarlagnum. Hetta kann t.d. vera í sambandi við umsóknir um veitingar ella tænastur frá tí almenna ella viðvíkjandi íkomnum hendingum ella støðum, ið viðvíkja rættartrygdini hjá fólki við breki og teirra avvarðandi.
Í fleiri førum hevur verið ráðgivið í kæru- og klagumálum, har løgfrøðiligi ráðgevin hevur vegleitt og hjálpt fólki við breki ella teirra avvarðandi við kæru til Føroya Kærustovn ella klagu til Kommunala eftirlitið ella Løgtingsins Umboðsmann. Ráðgevingin hevur, við fulltrú, umboða fólk í persónsmálum, hevur søkt um innlit teirra vegna og hevur í summum førum verið hjásiti í málunum. Slík mál ganga vanliga yvir fleiri mánaðir, og er ráðgevingin er við í ymsu viðgerðarstigunum.

2. Fyrispurningar og mál hjá løgfrøðiligu ráðgevingini

Niðanfyri er stuttur samandráttur av nøkrum av teimum málum, sum løgfrøðiliga ráðgevingin hevur veitt ráðgeving í. Talan er um fyrispurningar og áheitanir um løgfrøðiliga ráðgeving í ítøkiligum málum, sum eru komnir uttanífrá.

2.1. Fyrispurningar

2.1.1 Upplýsingar um fólk, ið vóru send á Rødbygaard

Fyrispurningur var frá kvinnu, sum vildi hava at vita hvussu hon kundu útvega sær upplýsingar um lívslagnuna hjá mammubeiggja sínum, ið varð sendur á stovn í Danmark, m.a. á Rødbygaard. Ráðgevingin kannaði løgfrøðiliga grundarlagið og spurdi seg fyri hjá fólki, ið hava granskað á økinum.
Atkoma til slíkar upplýsingar fæst gjøgnum Tjóðskjalasavnið í Føroyum og Ríkisarkivið í Danmark. Atkoman valdast tíðarskeiðið nær fólk vórðu send av landinum og hvørjir myndugleikar, ið umsótu málini júst tá. Viðkomandi lógir eru

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

løgtingslógin um skjalasøvn, arkivloven og dátuverdarlógin og tilhoyrandi kunngerðir.
Í Føroyum og Danmark eru upplýsingarnar í almennu søvnunum vanliga atkomiligar eftir ávíkavist 30 og 20 árum. Tó kunnu avmarkingar vera, t.d. viðv. viðkvomum persónsupplýsingum, sum gera tíðaravmarkingina longri, avíkavist 80 og 75 ár. Granskarar serliga fáa atgongd, eisini til viðkvæmar persónsupplýsingar, eftir lógarásettum undantøkum fyri granskarar.
Góð leiðbeining fæst á heimasíðunum hjá Tjóðskjalasavninum og Rigsarkivet, sum hava vegleiðingar og skipanir við sjálvavgreiðslu. Eisini fæst góð hjálp frá fólki á staðnum.
Ráðgevingin skrivaði eitt upprit viðvíkjandi fyrispurninginum, ið varð sent viðkomandi, umvegis felagið Javna.

2.1.2. Menningartarn og hjúnarband
Fyrispurningur var frá mammu, sum var stúrin um vakna dóttur, ið hevði menningartarn og ætlaði sær at giftast. Mamman upplýsti, at hon var verji hjá dóttrini, men ógreitt var hvussu víðfevnt verjumálið var. Hon stúrdi fyri, at dótturin kundu verða misnýtt fíggjarliga og vildi vita, um verja var móti hesum í altjóða rætti.
Ráðgevingin kannaði løgfrøðiliga grundarlagið og ráðførdi seg eisini við Familjufyrisitingina, sum umsitur verjumál.
Yvirskipað er rætturin til familjulív, undir hesum til at giftast, tryggjaður í altjóða rætti, sbr. ávíkavist grein 12 í europeiska mannarættindasáttmálanum og grein 23, stk. 1, litra a í Brekrættindasáttmálanum, sum løgtingið hevur samtykt. Eftir brekrættindasáttmálanum hava fólk við breki rætt at ganga í hjúnarlag, stovna familju og gerast foreldur á jøvnum føti við onnur.
Annars er lóggávan verjumálslógin og tilhoyrandi kunngerð. Er dótturin undir verjumáli, skal verjin møguliga, alt eftir slag av verjumáli, geva samtykki ella undirskriva vígslupappírini, mettti ráðgevi á Familjufyrisitingini. Um verjin noktaði, hevði dóttrini tó havt møguleika fyri at biðja um annan verja. Ein ítøkilig meting skal gerast av slíkum máli. Familjufyrisitingin ger eina meting og skal verjin skiftast, skal málið eisini fyri rættin.
Løgfrøðiliga ráðgevingin skrivaði eitt upprit, sum mamman varð kunnað út frá. Hon varð eisini kunna um møguleikan at venda sær til Familjufyrisitingina fyri at fáa neyvari kunning um verjumálið og viðurskiftini annars.

2.1.3. Eftirløn útgoldna í ótíð
Fyrispurning var frá manni um 50 ára aldur, um at fáa eftirlønina útgoldna fyri tíð. Maðurin hevði søkt tryggingarfelagið LÍV um loyvi at fáa eftirlønaruppsparingina, umleið 700.000 krónur útgoldna í ótíð. Orsøkin er, at hann hevur eitt brek, sum

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

ger, at heilsan viknar við árunum, og tí hevði hann áhuga í at seta pening í ein bústað meðan hann enn er væl fyri.
LÍV hevði noktað umsóknini, men av tí at grundgevingarnar og tilvísingar til rættarreglur vóru óneyvar varð biðið um neyvari grundgevingar og innlit í rættargrundarlagið.
Meginreglan er, at eftirlønin verður útgoldin, tá ið fólk røkka fólkapensiónsaldri. Tó eru nøkur undantøk, og tá kann rættarliga grundarlagið vera ymiskt.
Fyri eftirlønina, sum er uppspard *eftir* 1. januar 2014, er eftirlønarlógin galdandi. Lógin hevur eitt m.a. undantak sum merkir, at 15% av samanspardu upphæddini kann útgjaldast beinanvegin og restin yvir 10 ár, um tað kann skjalprógvast, at persónurin hevur eina sjúku, ið ger, at væntaði livialdurin er styttri enn hjá øðrum.
Viðvíkjandi samansparingin *fyri* 1. januar 2014 eru rentutryggingarlógin og pensjónsavtalan millum LÍV og fakfelagið galdandi. Reglurnar, sum víst verður til, hava nøkur ítøkilig undantøk um útgjald í ótíð, sum maðurin tó ikki kom undir.
Av tí, at fakfeløgini í stóran mun hava ræði á hesum avtalum kann tað ikki útilokast, at limir í serligum førum kunnu fáa felagið at gera frávik í samráð við tryggingarfelagið. Vansin við hesum er tó, at skuldi tað borið til at gjørt slíkt frávik, hevði útgjaldið verið rakt av sera høgum skatti.
Samansparingin hjá manninum stavaði umleið helvt um helt frá tíðini ávíkavist fyri og eftir 1. januar 2014. Kanningarnar hjá ráðgevingini vístu samaumtikið, at tað helst var ikki ómøguligt at fáa ein *part* av uppsparingini útgoldna. Vansar vóru tó við loysnini, sum langt frá heldur nøktaði tann aktuella kapitaltørvin hjá manninum; umframt útlitini til eina verri fíggjarstøðu sum fólkapensionistur.

2.2. Fyrisiting

2.2.1 Starvsfólkamál: Pápin í ansingarfarloyvi

Ein pápi, sum hevði verið í 1½-ára óløntum farloyvi fyri at vera heima og ansa soninum, sum hevur fjølbrek, bað um ráðgeving í starvsfólkamáli. Stutt áðrenn farloyvistíðin var av, hevði pápin boða frá, at umstøðurnar heima gjørdu, at hann ikki kundi koma aftur til arbeiðis 1. oktober sum ætlað, og bað tí um at fáa farloyvið longt. Hetta kundi arbeiðsplássið ikki játta honum og metti fráboðanina sum, at pápin hevði sagt seg sjálvan úr starvi við ein mánaða uppsagnartíð, við tað, at hann hevði sagt arbeiðsgevaranum frá, at hann ikki møtti aftur sum avtalað.
Av tí, at tað var óvist, um hann hevði nakað rættarkrav um longt farloyvi í óvissa tíð, afturat 1½-ára farloyvinum, ynskti pápin, at *arbeiðsgevarin* í staðin segði seg úr starvi, so, at hann fekk uppsagnarløn í 4 mánaðir, afturímóti einum mánaði, um hann *sjálvur* segði upp. Hetta vildi arbeiðsgevarin tó ikki ganga við til.
Ráðgevingin gjørdi uppskot til loysn at leggja fyri arbeiðsgevaran, har víst varð til ásetingar í kollektivum sáttmála og meginreglur í starvsmannarætti, tá ið starvsfólk ikki koma aftur til arbeiðis eftir lokið farloyvið. Úrtslitið var, at partarnir gjørdu semju, har pápin fekk eina fráfaringaravtalu, sum gav honum fulla løn,

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

eftirløn og onnur uppsagnarrættindi í 3 mánaðir, og hesa loysn var hann væl nøgdur við.

2.2.2. Leigumál I: Leiguhækking í vardum bústøðum
Í sambandi við, at leigan hjá teimum, sum leiga bústað frá Almannaverkinum, tað er m.a. tey sum búgva í vardum bústøðum, hækkaði 1. januar 2024, bað Javni um eina løgfrøðiliga meting av málinum. Ráðgevingin læt Javna eitt løgfrøðiligt upprit um leiguhækkingina, har møguleikarnir í einum konkretum leigumáli og møguleikar hjá feløgunum í málinum generelt vórðu lýstir.
MEGD og Javni sendu Almannaverkinum eitt skriv, har stovnurin varð biðin um at útgreina heimildargrundarlagið fyri leiguhækkingini og hví broytingin ikki varð send til hoyringar. Eisini varð spurt um heimildina fyri at áseta, at leigan er *uttan* ljós og hita, og at leigumálini kundu tulkast sum at leigarin eisini *sjálvur* skuldi rinda útreiðslurnar av at viðlíkahalda bústaðin.
Almannaverkið vísti á, at leiguhækkingin er heimilað í lóg og metti ikki, at neyðugt var við nakrari hoyring, við tað at leiguhækkingin ikki var ein fyrisitingarliga avgerð. Sambært svarinum skulu leigararnir tó *ikki* rinda eyka fyri viðlíkahald, og Almannaverkið ásannaði samstundis, at kunngerðin, sum heimilar eitt serskilt gjald fyri olju og hita – afturat leinguni – samsvarar *ikki* við lógina, og at Almannamálaráðið eftirkannar hetta ivamálið um lógargrundarlagið viðvíkjandi leigumálunum.
Málið um leiguhækkingina varpar ljós á týdningin av, at hoyringsrætturin hjá feløgunum sambært Brekrættindasáttmálin verður virdur. Haraftruat varpar málið ljós á ymisk viðurskifti við leigumálunum í Almannaverkinum, sum tykjast ivasom og mugu greiðast, m.a. óneyvar reglur um leigumálini og hvussu leigarar við menningartarni verða umboðaðir, tá ið teir hava skrivað undir leigumálini. Fýra ár eftir, at lógin um almannatrygd og tænastur kom, er tíðin helst komin til, at Løgtingins Umboðsmaður kannar viðurskiftini, og undir hesum rættartrygdina hjá teimum, sum hava leigumál sambært hesi lóg, sum ikki eru fevnd av leigulógini og teirri vernd, hendan lóg gevur leigarunum.

2.2.3. Leigumál II: Bústaðir og stór leiguhækking
Hjúnarfelagi hjá kvinnu, ið hevur leigumál við Almannaverkið, bað um løgfrøðilig ráð í sambandi við, at konan hevði fingið boð um, at leigusáttmálin í framtíðini verður við almenna íbúðarfelagið Bústaðir. Útreiðslunar av leigumálinum fóru nærum at tvífaldast av hesum, tó at ongar broytingar skuldu vera í leigumálunum annars. Hvørgin av hjúnarfeløgunum høvdu biðið um at fáa leigumálið broytt.
Við ráðgeving frá MEGD sendi hjúnarfelagin Almannaverkinum eina áheitan, har spurt varð um heimildina at broyta leigumálið, hvussu leiguhækkingin samsvaraði við sosialu atlitini, sum liggja til grund fyri leigumálum eftir almannalógini og

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

heitt varð á Almannaverkið um ikki at taka nakra avgerð í málinum fyrr enn ætlanin varð send borgaranum til ummælis.
Meira enn eitt ár eftir, at boðað varð frá leiguhækkingini, var leigumálið framvegis ikki broytt. Fundur hevur síðani verið við Almannaverkið, har ráðgevin var hjásiti, og ein niðurstøða er, at málið hevur ikki verið handfarið tætt, og at leigarin, konan, skal fáa eitt ætlarnarskiv um broytingina í leigumálinum, við neyðugum grundgevingum og kæruvegleiðing.

Í báðum teimum umrøddu málunum um broytingar í leigumálum við Almannaverkið er lógargrundarlagið løgtingslógin um almannatrygd og tænastur og tilhoyrandi kunngerðir, hoyringsrætturin hjá pørtum eftir fyrisitingarlógini og meginregluni um góðan fyrisitingarsið, og hoyringsrætturin hjá feløgunum, ið umboða fólk við breki, eftir Brekrættindasáttmálanum hjá ST.

2.2.4. Hækkað gjald til felags innbúgv á vardum bústaði
Fyrispuringur var frá limafelagi og avvarðandi um ætlaða ógvusliga hækking í útreiðslum hjá fólki til felags innbúgv í vardum bústaði. Ráðgeving varð givin í sambandi við, at tey skuldu á fund við Almannaverkið. Víst varð á, at tað krevst eitt heimildargrundarlag – reglur á bústovninum – fyri at krevja slíkt gjald, at slíkar reglur og avgerðin um kostnaðarhækkingar skulu takast í felag saman við búfólkunum, og at kæruvegleiðin skal gevast, tá avgerð verður tikin. Heimildargrundarlagið í hesum sambandi er § 48 í almannalógini, lógarviðmerkingarnar og tilhoyradi kunngerð og § 71 í almannalógini um kæruvegleiðing.
Tey avvarðandi kærdu, men kæran varð avvísti vísandi til, at eingin fyrisitingarlig avgerð varð tikin í tí ítøkiliga málinum; at talan bert var um eina *hoyring*. Ætlaða stóra hækkingin í gjaldinum til innbúgv varð ongantíð sett í verk, soleiðis sum fráboðað varð av fyrstan tíð.
Í hesum sambandi er viðkomandi at nevna, at í øðrum kærumáli hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at ógilda eina generella avgerð hjá Almannastovninum á heysti 2023, um at búfólkini skuldu rinda eitt mánaðargjald til endurnýggjan av felags innbúgvi á 250 krónur. Almannaverkið hevði ikki heimild at krevja hesa upphædd, tí at hetta av røttum átti at verið viðgjørt saman við búfólkunum fyrst, og harafturat vóru ongar innanhýsis reglur ásettar viðvíkjandi gjøldunum.
Omanfyri nevndu mál um leigu og felags útreiðslur á vardum bústøðum varpa ljós á týdningin av, at vera á varðhaldi og ansa eftir heimildum og mannagongdum, tá Almannaverkið boðar frá broytingum í leigumálum og felags útreiðslum á stovnunum.

2.2.5. Fólk við breki og Samleikin

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Ein mamma bað um løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við, at sonur hennara, ið hevur sosiala angist, ikki fekk útvega sær talgilda Samleikan, ið gevur atgongd til netbanka og aðrar lyklatænastur. Avbjóðingin var, at hann hevði ikki neyðugt samleikaprógv, koyrikort ella gildugt pass, sum m.a. er eitt krav, tá tú skalt útvega tær Samleikan á netinum. Og sonurin setti seg ikki føran fyri at møta á Politistøðuni fyri at fáa passið dagført.
Lógargrundarlagið er løgtingslógin um talgildan samleika, sum heimilar landsstýrismanninum at gera neyvari reglur um m.a. skjalváttan av samleika, og eru hesar reglur ásettar í mannagongum og vegleiðingum.
Talgildu Føroyar (TF), sum umsita Samleikan, høvdu upplýst fyri mammuni, at hevur tú ikki pass ella koyrikort, eru reglurnar tær, at til ber til at møta á skrivstovuni hjá TF við aðrari skjalváttan, eittnú navna- og føðibrævi. Og við góðkendum vitnum, ið kunnu vátta samleikan hjá persóninum, kann Samleikin útvegast á henda hátt.
Eftir at ráðgevingin hevði vent sær til Fíggjarmálaráðið, ið umsitur TF, og biðið um innlit í neyvari reglurnar, bjóðaði stovnurin eina aðra loysn, har mamman, sum góðkent vitni, møtir á skrivstovuni hjá TF við gildugum samleikaskjølum, og sonurin er á Teams ella Skype og svarar kontrolspurningum fyri at vátta sín samleika á tann hátt.
Málið vísir, at hóast reglurnar kunnu vera liðiligar viðvíkjandi fólki við breki og at TF vísir tekin um at vilja strekka seg fyri at finna loysnir á serligum støðum, so er mark fyri kortini: Stovnurin er bundin at halda strangar mannagongdir og liva upp til altjóða trygdarkrøv viðvíkjandi talgildum samleika, sum kunnu vera trupult at sleppa uttan um.

2.2.6. Samlagstrygging og vart starv
Maður við niðursettari sjón bað um ráðgeving í sambandi við, at hann hevði fingið at vita, at hann ikki kundi vera við í tí vanligu samlagstryggingini hjá Starvsfelagnum við tryggingarfelagið LÍV, sum m.a. fevnir um lívstrygging og trygging móti ávísum hættisligum sjúkum. Samlagstryggingar eru bólkatryggingar (gruppeliv), sum fakfeløg ofta tekna og sum eru bíligari fyri limirnar. Í staðin kundi hann fáa atgongd til eina minni trygging, við at rinda eitt serstakt gjald, sum tó ikki gav dekning fyri ávísar hættisligar sjúkur. Grundgevingin var, at hann var í tillagaðum starvi.
Ráðgevingin kannaði lógargrundarlagi og var á kunnandi fundi við deildarleiðara í LÍV, sum hevur nógvar av samlagstryggingunum í Føroyum. Meðan Brekrættindasáttmálin hjá ST bannar mismuni vegna brek í sambandi við at tekna tryggingar, virkar tryggingarrætturin í Føroyum, eins aðrastaði á handilsligum grundarlagi, har avtalufrælsi, váðametingar og váðaspjaðing eru lyklahugtøk. Í øðrum londum eru tó almennar lógir, ið banna mismuni vegna brek, og sum geva fólki við virkistarni eina betri rættarverju, m.a. á tryggingarøkinum.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Samlagstryggingarnar eru ásettar í avtalum millum fakfeløg og tryggingarfeløg, í hesum førum millum Starvsfelagið og LÍV. Annars framganga tryggingartreytirnar av tryggingarlóggávu og teknikum treytum.
Sambært ítøkiligu tryggingaravtaluni eru limir, sum hava verið í vanligum starvi, og sum síðani fara í tillagað starv, framhandandi fevndir av tí vanligu samlagstryggingini, og sum verður drigin av teirra inngjaldi til eftirlønina. Er starvsfólkið hinvegin í tillaganum starvi, *tá ið tað gerst limur*, er innlimanin í tryggingina tó «treytað av fullum arbeiðsførleika», og í staðin bjóðar Starvsfelagið so hesum fólkum eina avmarkaða trygging fyri eitt ávíst gjald.
Hóast avtalufrælsi er útgangsstøði á tryggingarøkinum, eru krøv um, at tryggingarfeløg skul gera individuellar metingar í málunum, at viðgerðin skal vera reiðilig og loyal, og at tey skulu grundgeva fyri sínum avgerðum. Í tí konkreta málinum var eingin ítøkilig heilsumeting gjørd, og maðurin søkti tí av nýggjum og hevur útfylt neyðugu heilsuupplýsingarnar. Bíða verður eftir endaligari avgerð.
Málið vísir, at tørvur er á, at fáa lýst rættindini hjá fólki við breki at tekna tryggingar í Føroyum betri. Skipanin við samlagstryggingum, sum eru sera týdningarmiklar tryggingar á arbeiðsmarknaðinum, tykist stirvin og ikki at taka neyðug atlit til fólk við breki. Skipanin loyvir antin limaskapi ella ikki og hevur ikki aðrar møguleikar, sum t.d. í hesum føri vanligan limaskap við hægri inngjaldi og/ella klausulum, har váðin verður mettur at vera serliga høgur.
Brekrættindanevndin hjá ST hevur í síni nýggjast frágreiðing heitt á limalondini, um at seta neyðug tiltøk í verk, m.a. lóggávu, til tess at tryggja, at fólk við breki hava atgongd til tryggingar á jøvnum føti við onnur. Í samskiftinum við LÍV hevur MEGD vísst á, at neyðugt er at føroysk tryggingarfeløg fyrireika seg til, at Føroyar, sum úrslit av tilmælum frá ST-nevndini, áðrenn langt um leingi fara at fáa eina almenna lóg móti mismuni vegna brek, sum m.a. kann fara at ávirka samlaða lógargrundarlagið, tryggingarfeløg virka á.

2.2.7. Samlagstrygging og vøddasvinn
Maður við viðføddum breki, sjúkuni CMT, Charcot-Marie-Tooth, ið gevur vøddasvinn við aldrinum, fekk avslag frá tryggingarfelagnum LÍV um limaskap í samlagstrygging, við teirri grundgeving, at hann í eini heilsulýsing hevði upplýst, at hann hevur CMT. Nærri grundgevingar vóru ikki um á hvønn hátt sjúkan var ein fíggjarligur váði, ið ávirkaði tryggingarmøguleikan.
Spurnartekn kundi setast við hvørt grundgevingin var saklig og nøktandi. Við tað, at tryggingarfeløg hava eina grundgevingarskyldu og skulu grundgeva reiðiliga og loyalt, vóru ráðini, at biðja LÍV um nærri grundgeving fyri avslagnum, hví tað ikki varð upplýst um aðrar tryggingarmøguleikar enn samlagstrygging, evt. við hækkaðum inngjaldi og/ella sertreytum um at geva kundanum kæruvegleiðing í málinum.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Av tí at vit í Føroyum ikki hava nakra generella lóggávu um bann móti mismuni vegna brek, sum er galdandi eittnú á tryggingarøkinum, verða slík kærumál (enn) bert viðgjørd í teimum skipanum, sum eru á tryggingarøkinum og ikki (eisini) í serligum kærunevndum, ið viðgera mál um mismun, sum gjørt verður aðrastaðni, har lóggávan viðvíkjandi mismuni vegna brek er ment.

2.2.8. Pápin, sum kendi seg útilokaðan

Áheitan um løgfrøðiliga ráðgeving kom frá pápa, sum hevur vaksnan son við menningartarni, ið býr á stovni. Drongurin er uppvaksin hjá báðum foreldrum, sum vóru farin frá hvørjum øðrum, tá ið sonurin bleiv myndugur og tey sita ikki væl um sátt í dag. Pápin hevur ampa av viðurskiftunum við sonin; upplivir, at sonurin vendir sær baki, tá hann kemur á vitjan og pápin heldur, at mamman stýrir soninum og hevur fingið vent hann móti pápanum. Eisini heldur hann, at tekin eru um, at sonurin mistrívist. Sonur er undir avmarkaðum fíggjarligum verjumáli, undir settum verja, men er annars myndugur.

Saman við ráðgeva hjá einum av limafeløgum, hevur løgfrøðiliga ráðgevingin vegleitt pápan um rættindi og verið í samskifti og havt fund við leiðsluna á stovninum og í Almannaverkinum um støðuna. Víst hevur verið á, at hóast sjálvsavgerðarrætturin hjá soninum er týdningarmikil og skal virðast, leggur almannalóggávan eisini dent á týdningin av *foreldrasambandi og samstarvi við tey avvarðandi*, og at Almannaverkið, sum hevur umsorgan fyri fólk á stovni, hevur skyldu at virka fyri, at rætturin til familjulív verður útintur, og, at tey, sum búgva á stovni kunnu hava gott samband við bæði foreldur.

Almannaverkið hevur víst aftur, at sonurin mistrívist á stovninum. Ráðgevingin hevur upplýst pápan um, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur eftirlit við vardum bústøðum, m.a. námsfrøðiligt eftirlit og hvussu búfólk trívast og hevur vegleitt um kærumøguleikan, um hann metir seg hava haldgóðar grundir fyri sínum stúranum.

2.2.9. Sálarsjúkur í bústaðarneyð

Áheitan kom frá Sinnibata um løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við mál um tilkomnan mann í Havn við sálarligum trupulleikum, ið var komin í bústaðartrupulleikar. Hann hevði staðið á bíðilista til vardan bústað undir Almannaverkinum síðani 2018 og var uppsagdur á privata bústaði sínum.

Kontaktpersónarnir hjá manninum høvdu verið í samband við Almannaverkið og høvdu fleiri ferðir fingið at vita at útlit vóru til, at maðurin kundi fáa ein hóskandi bústað. Hetta vísti seg tó ikki at halda. Eisini var trupulleikin, at umboðini hjá manninum hava havt trupult við at fáa samband við málsviðgerarnar í Almannaverkinum

Ráðgevingin bað um partsinninnlit í málið. Eisini varð Almannaverkið biðið m.a. um sakliga grundgeving fyri, at hann ikki fekk tilboð um bústað á Blómubrekku,

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

við tilvísing til, at hann ikki gongur undir eitt ávís aldurmark (25-45 ár), sum Almannaverkið hevur ásett fyri búfólkið har. Víst varð eisini á ráðgevingarskylduna eftir almannalógini, sum hevur sum fortreyt, at tað ber til at koma í samband við og fáa vegleiðing frá málsviðgerðunum í Almannaverkinum. Almannaverkið hevur víst á, at støðan er trupul. Bústaðartrupulleikarnir í samfelagnum merkist eisini hjá Almannaverkinum, sum stríðist við langar bíðilistarnir til bústaðirnar, og, at hetta rakar eisini nógv sálarsjúk fólk, ið hava bíðað í nógv ár eftir bústaði. Viðvíkjandi Blómubrekku verður sagt, at stovnurin eftir meginregluni um faktiska fyrisiting metur seg hava heimild og sakligar grundir at áseta eitt aldurmark fyri at fáa røttu samanseting av brúkarum. Almannaverkið viðgekk, at málsviðgerðin hevði ikki verið nøktandi og at málið skuldi verið betri upplýst og stovnurin hevur tikið stig til, at sambandið verður betri millum partarnar.
Ein loysn var til endans funnin, so at maðurin fekk ávíst nýggjan bústað gjøgnum Bústaðir, sum hann hevur tikið av. Viðvíkjandi heimildini at áseta aldursmark fyri bústaðirnar á Blómubrekku, hevur ráðgevingin mett, at hetta er ein spurningur, sum Sinnibati, kanska saman við MEGD, eigur at kanna nærri.

2.2.10. Neyðarróp á røktarheiminum
Kona ein fólkapensionist, ið er avlamin og situr í koyristóli og býr á røktarheimi, bað um ráðgeving og umboðan í sambandi við, at tey høvdu sent kommununi eitt neyðarróp um ymisk viðurskifti, sum tey vóru stúrin um á heiminum. Víst varð á, at stovnurin er undirmannaður, serliga um vikuskiftið, og at hetta kennist ótrygt og gekk útyvir røktina, at starvsfólk hevði óvirðiligan atburð, og at samskiftið millum stovnin og deildina fyri hjálpartól í Almannaverkinum var vánaligt og gav búfólkinum trupulleikar. Eisini varð víst á, at maðurin síðani 2019 hevði havt eitt ynski um at fáa ein serligan koyristól, ið kundi lætt honum munandi um flytførið, men sum hann framvegis ikki hevði fingið.
Ráðgevingin kannaði lógargrundarlagið og fekk partsinnlit í málsviðgerðina fyri at upplýsa málið og var hjásiti á fundi, sum fingin varð í lag við leiðsluna á røktarheiminum og yviskipaðu leiðsluna í kommununi.
Á fundinum vísti ráðgevingin m.a. á, at lógin um heimatænastu, eldrarøkt vm. áleggur kommununum, ið hava ábyrgd av røktarheimunum, at tryggja, at borgarar, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt og stuðli, sambært lógini fáa neyðugu hjálpina og at Brekrættindasáttmálin hjá ST merkir, at fólk við breki hava sjálvsavgerðarrætt og krav um at verða viðfaring við virðing.
Á fundinum ásannaði leiðslan, at tað vóru stórir trupulleikar við undirmanning, at hon var varug við trupulleikarnar við atburði hjá ávísum starvsfólki og hevði tikið hond um hetta. Víst varð á, at eldralóg og heilsulóggáva skulu fylgjast, at landslæknin hevur heilsuligt eftirlit við stovnunum, og at tað tí er umráðandi, at eyðmerkja og loysa trupulleikarnar.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Viðvíkjandi koyristólinum varð niðurstøðan, at ein umsókn skuldi sendast Almannaverkinum, við tilmæli frá leiðandi fysioterapeti, og umleið tveir mánaðir eftir fundin varð umsóknin um serliga koyristólin loksins játtað. Tey avvarðandi hjá manninum hava boðað ráðgevingini frá, at tað tóktist, sum at trupulleikarir hjá manninum sum heild vórðu tiknir í størri álvara av stovni og myndugleika enn tey hava upplivað fyrr.

2.2.11.Vantandi kunning til avvarðandi

Mamman at einum vaksnum soni við menningartarni, sum býr á vardum bústaði, bað um ráðgeving, tí hon var stúrin um ávís viðurskifti hjá soninum og fekk ikki nakra kunning um m.a. hvussu hansara pensión varð umsitin, klædnabrúk og onnur viðurskifti, soleiðis sum hon sá at onnur foreldur fingu. Eisini hevði sonurin undirskrivað nýggjan leigusáttmála við Almannaverkið, uttan at havt nakað umboð við sær.

Sonurin er ikki undir verjumáli, men umsitur Almannaverkið fyritíðarpensjóinina fyri hann, smbrt. § 35 í lógini um almannapensjónir o.a..

Saman við ráðgeva á Javna hevði ráðgevingin samskifti og fund við stovnsleiðsluna og yvirskipaðu leiðsluna í Almannaverkinum um trupulleikarnar. Dentur varð lagdur á týdningin av góðari ráðgeving til tey avvarðandi og rættin at vera hoyrd og tikin við upp á ráð í viðurskiftum viðvíkjandi soninum, sum er við til at tryggja hansara sjálvsavgerðarrætt. Rættindi, sum framganga av almannalógini og Brekrættindasáttmálanum hjá ST.

Semja var um, at rættindini skulu virðast og at viðurskiftini kunnu betast, og skrivlig avtala varð gjørd um hvussu hetta verður skipað frameftir: Kunnandi fundur verður við foreldini hvønn mánað. Tá týðandi avgerðir verða tiknar, t.d. broytingar í leigumáli og felags útreiðslum á bústaði, skal borgarin altíð hava møguleika at vera umboðaður, t.d. av avvarðandi. Umboðini fyri Almannaverkið ásannaðu á fundinum, at menningartarnaði maðurin hevði undirskrivað eitt leigumál, uttan at hava nakað umboð við sær. Hetta átti ikki at verið komið fyri, og tann ítøkiliga hendingin varð fráboðað innanhýsis á stovninum, varð upplýst.

2.2.12. Politiforhoyr uttan foreldur

Ein mamma bað ráðgevingina um hjálp í sambandi, at sonur hennara, ið hevur ADHD og sum er í skúlaaldri, hevði verið til avhoyringar hjá politinum. Mannan er støk og er einsamøll um sonin. Sambært mammuni fekk hon einki at vita um avhoyringina, var ikki hjástødd og fekk ikki í boði at vera við. Drongurin hevur havt avbjóðingar, sum hevur samband við staðfesta brekið, og mamman setti spurnartekn við rættartrygdina.

Mamman hevur verið hjá MEGD og greitt nærri frá hendingini, og løgfrøðiliga ráðgevingin kannar nú viðurskiftini nærri, løgfrøðiliga grundarlagið og tað, sum hendi. Av tí, at drongurin hevur brek, er tað týdningarmikið, at eingin ivi er um

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

rættartrygdin í slíkum føri. Eisini hevur mamman fingið ráðgeving um rættin til skúlagongd. Málið er opið og verður viðgjørt.

2.2.13. Uppfylging av klagumáli: Lestrarumstøður hjá deyvum
Ein kvinna, sum er deyv, vann í 2021 vann eitt klagumál í Javnstøðunevndini, har staðfest varð, at Fróðskaparsetrið breyt lógina um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna brek, tá stovnurin noktaði henni at fara upp til roynd fyri triðju ferð í einum faki, so sum reglurnar annars heimila. Løgfrøðiliga ráðgevingin hjá Megd hevur síðani á heysti 2023 tikið virknan lut í arbeiðinum, at útvega tær *tillagingar í lestrarumstøðunum*, sum eru neyðugar og kvinnan hevur rættarkrav um.
Eftir at hava vunnið málið gjørdi kvinnan eina miseydnaða roynd at fáa eina skipan við Fróðskaparsetrið, sum hon kendi eg trygga við. Við tað, at javnstøðulógin leggur upp til, at brot skulu rættast, hevur løgfrøðiliga ráðgevingin, saman við kvinnuni og hennara ráðgevum, verið í samskifti við Javnstøðunevndina um málið, sum aftur hevur havt fund við leiðsluna á Fróðskaparsetrinum, um at útvega rímiligar karmar um hvussu lestnaður kann skipast fyri ein lesandi, ið er deyvur.
Fundir hava síðani verið millum kvinnuna og Fróðskaparsetrið. Av tí, at hetta er fyrstu ferð, at Fróðsksparsetrið skipar lestur fyri deyv, má ásannast, at stovnurin hevur nógv av læra, og í tilgongdini hevur stovnurin havt vitjan av deyvari kvinnu úr Danmark, sum hevur tikið útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur.
Sambært Brekrættindasáttmálin hjá ST og føroyskari lóggávu skulu útbúgvingarstovnar gera rímiligar tillagingar í lestrarumhvørvinum, so, at fólk við breki kunnu taka eina útbúgving á jøvnum føti við onnur. Uppgávan hjá løgfrøðiligu ráðgevingini hevur m.a. verið at upplýsa um tillagingarskylduna, sum áliggur Fróðskaparsetrinum í hesum sambandi, og at ansa eftir at hon verður hildin.
Í hesum málinum hevur Meginfelag Føroyskra Studenta, MFS, eisini vent sær til Fróðskaparsetrið og mint á týdningin av, at skipa lestrarumstøðurnar so, at eisini fólk við breki kunnu lesa á Fróðskaparsetrinum.

2.3. Kærumál, klagumál og rættarmál
2.3.1 Viðlíkahaldsvenjing markað til ávísar diagnosur
Mamma at 18 ára gomlum dreingi við víðfevndum likamligum breki bað um ráðgeving í kærumáli. Almannaverkið hevði í fyrstu atløgu nokta soninum viðlíkahaldavenjing eftir almannalógini, vísandi til, at játtanin var ov lítil at røkka øllum, og Almannaverkið, í samráð við Almannamálaráðið, hevði avgjørt, at viðlíkahaldsvenjing er avmarkað til sjúkurnar parkinson, sclerose og seinheilaskaða, sum drongurin tó ikki var fevndur av.
Mamman hevði kært avgerðina og fingið viðhald í Føroya Kærustovni, sum m.a. vísti á, at tað var í stríð við líkaregluna í fyrisitingarrættinum at gera mun millum

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

diagnosur. Kærustovnurin heimvísti avgerðina til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum, sum í nýggjari avgerð tó kom til somu niðurstøðu sum fyrru ferð.
Í eini kæru um seinni avgerðina hjálpti ráðgevingin við einum ískoyti til kæruna, har m.a. vístvarð á, at kærustovnurin hevur møguleika, at broyta fyrisitingarligar avgerðir og, at tað – umframt brot á almannalógina – er í stríð við forboðið móti mismuni í Brekrættindasáttmálanum at gera mun millum diagnosur.
Meðan seinna kæran var til viðgerðar hevur Almannaverkið gjørt av at broyta skipanina. Tilboðið um viðlíkahaldsvenjing er nú víðkað til at fevna um *allar* heimabúgvandi borgarar, í aldrinum 18 ár til pensjónsaldur, við skerdum førleikum ella sjúku, ið hava ávirkan á gerandisdagin. Avmarkingin til ávísar diagnosur er sostatt *slept.*
Umframt, at felagið CP Føroyar hevur arbeitt við hesum málinum leingi, hevur tað ítøkiliga kærumálið ivaleyst virka við til, at praksis viðvíkjandi játtan av viðlíkahaldsvenjing er broyttur og komin í betri samsvar við lóg og sáttmála.

2.3.2. Tillagað starv av sosialum grundum
Heitt varð á løgfrøðiligu ráðgevingina um at veita hjúnarfelaga hjá konu við alzheimer demens ráðgeving. Orsøkin var, at Almannaverkið hevði givið manninum avslag um at koma undir skipanina við tillagum starvi eftir § 21 í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk. Av tí, at maðurin ansaði konuni heima fekk hann ikki arbeitt fulla tíð og varð haraftrat hart pressaður mentalt av støðuni.
Við hjálp frá løgfrøðiligu ráðgevingini varð avgerðin kærd til Føroya Kærustovn, har gjørt varð galdandi, at maðurin hevði rætt til at koma undir tillagað starv eftir ásetingini í § 21, stk. 2 í almannalógini, við tað, at arbeiðsførleikin var minkaður orsaka av ”týðandi persónligum sosialum viðurskiftum”, sum er ein av treytunum í ásetingini. Hetta vóru viðurskifti, sum Almannaverkið *ikki* hevði mett um og tikið við í sína avgerð.
Kæran hevði við sær, at Almannaverkið avgjørdi at taka málið upp til nýggja viðgerð, við tað at nýggjar og týðandi upplýsingar vóru komnar fram í kæruni. Ímeðan vóru viðurskiftini hjá hjúnum broytt. Heilsustøðan hjá konuni var so mikið versnað, at hon noyddist á røktarheim at búgva, og fortreytrinar fyri at koma undir skipanina við tillagaðum starvi vóru nú burtur.
Fyri mannin og fólk í líknandi støðu hevði tað tó prisipiellan týdning at fáa Kærustovnin at staðfesta, *um* støður sum hesar – har sosialir trupulleikar heima elva til niðursettan arbeiðsførleika – *eru* fevndar av § 21, stk. 2 í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk. Við tí fyri eyga at fáa rættarstøðuna staðfesta hesum viðvíkjandi varð málið tí kært einaferð afturat, eftir, at Almannaverkið aftur hevði nokta manninum tillagað starv, nú konan ikki varð heima longur og fortreytirnar fyri tillagaðum starvi vóru dotnar burtur.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Í kæruavgerðini hjá Føroya Kærustovni framgongur, at støður sum tær hjá kærararnum *kunnu verða fevndar* av lógini, tá vanliga kravið um, at arbeiðsførleikin er varandi skerdur við 1/3, annars er lokið. So hóast kærustovnurin, sum væntað, staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum, nú viðurskiftini hjá manninum vórðu broytt, varð endamálið við kærununi tó rokkið, við tað, at tað nú er staðfest, at mál av hesum ikki mugu avvísast av Almannaverkinum, soleiðis sum gjørt varð. Slíkar umsóknir skulu kannast nærri, tí tær kunnu koma undir § 21, stk. 2 sum "týðandi persónlig sosial viðurskifti." Tí er hetta ein kæruavgerð, sum kann fáa týdning fyri rættindini hjá fólki við breki og teirra avvarðandi í støðum sum hesi frameftir.
Í málinum fekk maðurin eisini avslag upp á umsókn um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku eftir almannalógini, við teirri grundgeving, at sjúkan hjá konuni (alzheimer) er ikki seinheilaskaði, sbr. § 26, stk.1, nr. 3 í almannalógini. Málið vísir, at tørvur er á at eftirkanna hesa lógarásetingina fyri at vita, um tað er í samsvari við meginregluna um javnviðgerð og bannið móti mismuni at gera slíkan mun millum sjúkur ella brek viðvíkjandi endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

2.3.3. Stuðul at keypa bil I
Mamman hjá eini vaksnari dóttir við menningartarni, sum býr heima, bað um løgfrøðiliga ráðgeving, eftir, at Almannaverkið hevði nokað dóttrini stuðul at keypa persónbil eftir í § 26 almannalógini, sum varð galdandi fram til 1. januar 2024.
Við hjálp frá ráðgevingini kærdi mamman avgerðina, har vístvarð á fleiri brek í málsviðgerðini, m.a. at kravdar heilsuupplýsingar væntaðu, at eingin partshoyring hevði verið, og at málið hevði ligið í Almannaverkið í sera drúgva tíð áðrenn nøkur avgerð varð tikin. Eftirsum týðandi brek vóru í málsviðgeðini avgjørdi Almannaverkið undir kæruprocessini at taka málið upp til nýggja viðgerð, og endaði hesuferð við at játtað dóttrini stuðul til keyp av persónbili.

2.3.4. Stuðul at keypa bil II
Pápin hjá einum tilkomnum soni við rørslutarni bað um løgfrøðilig ráð, eftir at Almannaverkið hevði noktað soninum stuðul til keyp av persónbili. Grundgevingin fyri avslagnum var, at stuðulsskipanin eftir almannalógini varð tikin av við virknaði frá 1. januar 2024, at lógarheimild ikki varð til longur, at játta stuðul til keyp av persónbili.
Tá løgtingið samtykti at taka av skipanina við persónbili í sambandi við viðgerðina av løgtingsfíggjarlógini fyri 2024 vísti MEGD á, at uppskotið varð lagt fram, uttan at tað hevði verið til ummælis hjá feløgunum, ið umboða fólk við breki, og at hetta var í stríð við hoyringsskylduna eftir Brekrættindasáttmálanum hjá ST. Eisini vísti MEGD á, at tað at taka slík rættindi aftur kann vera í stríð við kravið í ST-sáttmálanum um støðugt at menna eittnú sosial og fíggjarlig rættindi hjá fólki við

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

breki og gongur ímóti forboðnum at skerja slík rættindi, á tilvildarligan og óskipaðan hátt.
Við støði í hesum avgjørdu tey avvarðandi at royna málið hjá Føroya Kærustovni. Ìtøkiliga varð kærustovnurin biðin um at taka støðu til, hvørt avgerðin hjá Almannaverkinum kundi vera standandi, tá ið nógv bendi á, at hon varð grundað á eina lógarbroyting, sum varð í ósamsvari við landsins skyldur sambært Brekrættindasáttmálan hjá ST.
Kærustovnurin staðfesti bert avgerðina hjá Almannaverkinum, vísandi til, at løgtingið hevði strikað lógarheimildina at veita stuðul at keypa bil. Kærustovnurin vísti á, at hann hevur bert heimild at viðgerða ítøkiligar fyrisitingarligar avgerðir, og ikki hvussu lógargrundarlagið, sum hesar avgerðir eru tiknar á, samsvarar við altjða skyldur Føroya.
Givið er, at hetta var eitt óvanligt mál fyri kærustovnin. Tað skal hinvegin eisini síggjast í ljósinum av royndunum hjá MEGD at fáa løgfrøðiligan royndarstovn at taka støðu til, hvørt lógir ella lógarbroytingar kunnu gerast galdandi, um tær eru í ósamsvari við Brekrættindasáttmálan og harvið ganga ímóti § 55 í stýrisskipanarlógini; ein áseting, sum sigur, at lógir ella partar av lógum hava ikki gildi, um tær ganga ímóti altjóða sáttmálum, Føroyar hava bundið seg til. Hugsandi er tí, at hetta kærumál kann gerast partur av aðrari roynd, t.d. hjá løgtingsins umboðsmanni ella í rættarskipanini. Víst verður til part 1.3.4. omanfyri.

2.3.5. Stuðul at keypa bil III
Ein kona við rørslutarni, sum hevði kært eitt avslag frá Almannaverkinum um stuðul til keyp av bili eftir § 26 í almannalógini, ið varð galdandi til 1. januar 2024, tørvaði løgfrøðiliga hjálp, m.a. hjásita til fund á kærustovninum. Ráðgevingin mælti til nýggjar læknaváttanir frá kommunulækna og serlækna, og á fundinum við kærustovnin varð víst á brek í avgerðini, serliga tað, at avgerðin ikki tekur støðu til sosial viðurskifti og vandan fyri sosialari avbyrging, so sum lóggávan og Brekrættindasáttmálin hjá ST gera.
Kærustovnurin staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum. Við tað, at ivasom viðurskifti eru í avgerðini, hevur konan avgjørt at fara í rættin við málinum, og hevur løgfrøðiliga ráðgevingin veitt vegleiðing í sambandi við fyrireiking av stevningini.

2.3.6. Stuðul til heimadialysu - geiraábyrgd
Kona við nýrasjúku bað um løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við, at hon hevði kært avgerð hjá Almannaverkinum, um at nokta sær stuðul til kostnaðin av at byggja eitt dialysurúm við tilhoyrandi goymslu í nýggjum húsum til heimadialysu. Almannverkið metir, at slíkt er tengt at eini viðgerð, sum sjúkrahúsið varðar av, og at stovnurin tí ikki hevur heimild at veita stuðul til endamálið sambært § 27 í

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

almannalógini og tilhoyrandi kunngerð um stuðul til bústaðarbroytingar til persónar við týðandi og varandi skerdum virkisføri.
Í málinum hevði Almannaverkið gjørt viðmerkingar til eitt skriv, sum yvirlækni á Landssjúkrahúsinum hevur latið, og konan biður ráðgevingina um vegleiðing í sambandi við hetta aftursvarið hjá Almannaverkinum til læknan. Málið er í viðgerð.

2.3.7. Eingin hoyring, málið heimvíst til nýggj viðgerð
Foreldrini hjá 12 ára gomlum fjølbrekaðum dreingi bóðu um ráðgeving orsaka av vantandi tilboði um ansing og stovnspláss. Sonurin hevur verið á tveimum frítíðartilboðum, men varð fluttur frá tí eina til tað næsta, og tey høvdu søkt um at fáa hann á ein serstovn, sum var í gerð. Ímeðan høvdu tey fingið játtað avmarkaðan stuðul í heiminum, sum tey sjálvi skuldu útvega, men, sum tað vísti seg ikki at bera til at útvega.
Foreldrini løgdu málið fyri Føroya Kærustovn, har tey m.a. vístu á, at tey í tilgongdini vórðu koyrd av bíðilista og onga vissu høvdu fingið fyri, at tey fingu drongin á serstovnin. Men fingu ikki viðhald hjá Kærustovnurin.
Løgfrøðiliga ráðgevingin hjálpti foreldrunum at orða eitt íkoyti til klagu til Løgtingsins Umboðsmann, har vístvar á málviðgerðarfeilir, m.a. at foreldrini ikki vórðu hoyrd, táið sonurin varð tikin av bíðilistanum. Umboðsmaðurin sendi málið til ummælis hjá kærunevndini, sum avgjørdi at heimvísa tað til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum, vísandi til, at reglurnar um hoyring sambært § 18 í fyrisitingarlógini ikki vórðu hildnar.
Í málinum hevur løgfrøðiliga ráðgevingin eisini vent sær til Almannaverkið, sum hevur ásannað, at málsviðgerðin hevur ikki verið nøktandi. Stutt eftir hetta fingu foreldrini boð um, at sonurin um stutta tíð fór at sleppa inn á serstovnin, sum tey høvdu søkt um pláss á, og við hesum varð málið loyst.

2.3.8.Upplatingartíðirnar hjá frítíðarskúlunum
Ein mamma, sum hevur son við infatilari autismu, bað um ráðgeving í sambandi við, at sonurin, ið ikki kann vera einsamallur, ikki sleppur í frítíðarskúla, tá skúlarnir hava frí. Løgtingsins Umboðsmaður (LUM) kom í august 2023 til ta niðurstøðu, at § 3, stk. 2 í dagstovnalógini skal tulkast soleiðis, at frítíðarskúlanir skulu fylgja upplatingartíðunum hjá *dagstovnunum*, og harvið eisini ferium og frídøgum hjá dagstovnunum.
Umboðmaðurin gjørdi tó ikki meira við málið tá, við tað at Barna- og Útbúgvingarmálaráðið (BÚMR) hevði boðað frá, at dagstovnalógin fór at verða dagførd í næstum. Greitt er, at BÚMR er ósamt við tulkingina hjá LUM, og at lógin hevur verið praktiserað sambært tulkingini hjá ráðnum, har frítíðarskúlarnir hava fylgt *skúlunum og teirra frítíð*, og tískil hava verið stongdir í teimum longu

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

skúlaferium; nakað, sum hevur verið til stóra ampa fyri børn við serligum tørvi og teirra familjur.
Á sumri 2024 klagaði mamman, við ráðgeving frá MEGD um, at BÚMR framvegis ikki hevði rætta seg eftir tulkingini hjá umboðsmanninum og givið kommununum boð um at broyta praksis. Í niðurstøðu síni frá oktober 2024 sigur Umboðsmaðurin, at hóast hann framvegis *ikki* er samdur við tulkingini hjá BÚMR, so metir hann seg ikki heilt kunna vísa burtur tulkingina hjá ráðnum, sum í ávísan mun ”kann metast at samsvara við tað virkisfrælsi», sum sambært dagstovnalógini er lagt til kommununar at skipa dagstovnaøkið. Við hesum sipar LUM til at, sambært lógini kunnu kommununar *velja*, um tær vilja hava eitt ansingartilboð ella ikki. Og at hetta letur upp fyri, at tænastustøðið kann vera rættuliga ymisk frá kommunu til kommunu.
Umboðamaðurin, sum eisini er Barnanna Umboðsmaður, hevur tó í niðurstøðu síni eisini mett um, hvørt umsitingin av dagstovnalógini er í samsvari við Barnarættindasáttmálan. Her heldur LUM, at ”umsitingin hjá ráðnum lættliga kann føra við sær mismun og avbjóðandi umstøður fyri børn við serligum tørvi.”
Nú dagstovnalógin skal dagførast er tilmæli frá Umboðsmanninum tí, at dagføringin tekur støði í bestu loysn fyri Føroya børn, og at ”tað ikki er tilvildarligt hvørja tænastu børnini fáa og á hvørjum støði hon verður veitt, í mun til hvar í landinum tey búgva.”
Hetta klagumálið hevur varpað ljós á brek í lóggávuni, sum viðvíkur børnum við serligum tørvi. MEGD hevur tí heitt á arbeiðsbólkin, sum BÚMR setti í 2024 at gera tilmæli um dagføring av dagstovnalógini, um at taka tilmælini hjá umboðsmanninum í hesum klagumálinum til eftirtektar og við í viðgerðina, nú lógin skal broytast.
Í málinum hevur ráðgevingin eisini vegleitt kvinnuna um ymsar royndarmøguleikar, og hevur verið í áhaldandi samskifti við BÚMR, við tí fyri eyga, at fáa aðalráðið og kommununar, at fylgja tulkingini hjá Umboðsmanninum av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini: at frítíðarskúlanir skulu frídøgunum og feriunum hjá dagstovnunum, ikki hjá skúlunum.

Dánjal Højgaard, løgfrøðiligur ráðgevi
Tórshavn 28.02.2025

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo